## Opel nýggj-heitir í Geneve



Á altjóða bilaframsýningini í Geneve, ið er frá 5. til 16. mars, verða tríggjar nýggjheitir frá Opel: Luksusbilurin Opel Signum, Opel Speedster Turbo við 200 hk og toppferð uppá 240 km/t, og Opel GTC ið er ein smartur konseptbilur.

*Kelda: GM Danmark*

## Accent facelift



Hyundai Accent hevur fingið eina sokallaða "facelift". Umframt designbroytingar er 1,3 motorurin nakað broyttur, og bilurin fæst nú eisini við einum 1,6 litur motori við 103 hk.

*Kelda: Bil magasinet*

## Mitsubishi Chariot Grandis



Chariot Grandis er sami bilur sum Mitsubishi Space Wagon. Í Japan kemur bilurin á marknaðin í vár sum Chariot Grandis og á evropeiska marknaðin næsta ár sum Space Wagon.

*Kelda: Bil Magasinet*



*Audi A8 er ein sportligur luksusbilur við karossarii úr aluminium.*

# Audi A8 – luksusbilur úr aluminium



*Audi A8 innan. Har ar alt sum hoyrir til ein bil í hesum klassanum, sum t.d "one-toch memory" innbygt í startknøttin. Bilurin startar við at "identificera" fingramerkini hjá bilføraranum, síðan stilla setrini, klimaanleggið, rattið, radio og ymiskt annað seg inn til tann ávísa bilføraran*



*A8 hevur so avgjørt útsjóndina við sær. Bilurin kappast við teir stóru týsku luksusbilarnar*

**Audi A8 verður ivaleyst ein bilur, vit bert koma at síggja í útlandinum. A8 er ein luksusbilur sum kappast við teir stóru Mercedes og BMW. Karossaríið er gjørt úr aluminium**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

A8 er toppmodellið hjá Audi. Bilurin hevur so avgjørt útsjóndina við sær. Hann skal kappast við teir stóru Mercedes og BMW bilarnar. Talan er um ein rættan týskan sportligan luksusbil, tá hann er best. Audi A8 er sera væl útgjørdur við t.d. leðurinntrekk, fartpiloti, memory stilling og el-hita í báðum setrunum framman, memory stilling í rattinum. DVD-navigatiónssystemið er lætt at brúka og verður goymt burtur, tá tað ikki er í brúk. Fjaðraskipanin kann stillast til komfort, automatic ella dynamic (sport). Alt eftir hvussu fjaðraskipanin er stillað, senkar bilurin seg automatiskt, tá ferðin er yvir 130 km/t. Bilurin hevur ein framkomnan sekstrins automatiskan tiptronic girkassa við møguleika fyri at skifta við girstongini ella í rattinum. A8 fæst við tveimum V8 motorum við ávikavist 280 og 335 hk. báðir við 4x4 Quattro. Seinni kemur A8 við V6, V8 TDI og W12 motorum. Við allari tí framkomnu útgerð sum bilurin hevur sum standard og sum eykaútgerð, er her talan um ein bil við framúr góðum og komfortablum koyrieginleikum. Í Danmark, har bilurin kostar meira enn hálvaaðru millión, rokna teir við at selja umleið 15 bilar árliga. Størst marknaðurin fyri A8 er Týskland og USA.



# Altjóða átakið móti mannarættindabrotum í Russlandi

Í 102 síður longu frágreiðingini hjá Amnesty International The Russian Federation: Denial of Justice, sum varð almannakunngjørd 29. oktober 2002 í Moskva, verður greitt frá umfevnandi mannarættindabrotum í Russlandi. Víst verður á, hvussu offrunum verður noktað rættvísi, og hvussu tey eru fyri framhaldandi mannarættindabrotum. Tey, ið fremja brotsgerðirnar sleppa vanliga snikkaleyst.

Frágreiðingin vísir á mannarættindabrot í øllum landinum. Hesi umfata píning í varðhaldum og á politistøðum; ræðuligar ómenniskjaligar og vanærandi umstøður í yvirfyltum fongslum; rasistiskan yvirgang móti etniskum og religiøsum minnilutum og fremmandum; burturflytingar, »hvørvingar« og píning, herundir neyðtøkur.

Russisku myndugleikarnir klára ikki at tryggja, at kvinnur ikki verða illa viðfarnar av almennum embætismonnum í varðhaldum, fongslum og á politistøðum. Javnan koma frágreiðingar um misgerðir og píning, herundir neyðtøkur og aðrir seksuellir yvirgangir, sum fara fram í fongslum og á politistøðum. Hetta hendir m. a. tí, at myndugleikarnir ikki tryggja sær, at kvinnuligir politistar eru um konufólk í varðhaldinum, og at tær hava advokat hjá sær undir avhoyringum. Yvirgangsmennirnir sleppa næstan altíð snikkaleysir.

Fleiri kvinnur, sum uppliva yvirgang, velja at tiga og onki siga av ótta fyri at koma í hóslag við myndugleikarnar eina ferð aftrat. Tær, ið krevja rættvísi, møta eini rættarskipan, sum ignorerar harðskap móti kvinnum og letur teir seku ganga leysar. Tí halda almennu tænastumennirnir eisini, at teir kunnu halda fram við sínum misgerðum og gera tað, uttan at verða revsaðir.

Staturin klárar heldur ikki at tryggja kvinnum móti harðskapi við hús. Menn, sum buka ella neyðtaka konu sína, verða sjáldan revsaðir. Lógin umtalar ikki harðskap í heiminum sum eitt serligt lógarbrot. Sambært russisku myndugleikunum doyggja 14.000 kvinnur hvørt ár (tað eru umleið 40 um dagin) orsakað av harðskapi, sum er framdur av manninum ella øðrum skyldmonnum. Kortini gera myndugleikarnir ikki nógv fyri at steðga hesum. Umleið 50 lógaruppskot um harðskap í heimunum eru feld í parlamentinum.

**Tilráðingar frá Amnesty International**

Amnesty International vendir sær bæði til russisku myndugleikarnar og til altjóða samfelagið fyri skjótast at fáa bøtt um ræðuligu støðuna í Russlandi. M.a. verður skotið upp at viðtaka eina serliga revsilóg fyri harðskap í heimunum, at seta á stovn ein óheftan stovn, sum skal kanna, hvussu ofta og hvar píningar koma fyri og eisini at broyta skrásetingarskipanina og útflyggjanina av passi, tá núverðandi skipanin elvir til skipaðan kriminalitet sum t.d. burturflytingar av kvinnum og børnum.

Kvinnudagin 8. mars heitir Amnesty International á øll um at vera við í eini áheitan til russisku stjórnina um beinanvegin at staðfesta og valfrælsa gerðaskjalið at altjóða sáttmálanum um at beina burtur øll sløg av mismuni móti kvinnum. Hetta er ein skipan, sum ger at einstaklingar og bólkar av einstaklingum kunnu leita sær uppreisn á altjóða støði fyri brot á rættindi teirra eftir ST sáttmálanum um rættindi hjá kvinnum, sum uppreisn ikki er fingin fyri í heimlandinum.

Russiska samveldið skrivaði undir valfrælsa gerðaskjalið 8. mai ár 2001, og Amnesty International heilsar hesum sum eini ábending um, at landið ætlar at lata seg binda av ásetingunum í gerðaskjalinum.

Russiska Samveldið pliktaði seg til at halda ST sáttmálan um rættindi hjá kvinnum, í tí at tað staðfesti hann í januar ár 1981. Amnesty International heitir inniliga á russisku stjórnina um at staðfesta valfrælsa gerðaskjalið beinanvegin, og soleiðis taka enn eitt stig fram móti at útvega kvinnum í Russiska Samveldinum rættvísi.

Um tú vilt verða við í hesi áheitan, kanst tú skriva eitt postkort ella eitt bræv til uttanríkismálaráðharran í Russiska Samveldinum. Tú kanst eisini fara inn á heimasíðuna hjá Amnesty International, Føroya deild. Adressan er: amnesty@amnesty.fo.







